Sosialurin

# VARPIÐ

FRÍGGJADAGUR 21. apríl 2006



## Sugarland Express

Lou Jean verður latin leys eftir at hava sitið fyri tjóvarí. Hon fer til mannin Clovis, sum verður latin leysur um ikki so langa tíð, og fortelur at myndugleikarnir hava gjørt av, at sonurin skal latast til ættleiðing. Lou Jean fær Clovis til at flýggja, og í einum rændum politibili fara tey til Sugarland fyri at flyta dreingin burtur frá fosturfamiljuni og tætt í hølunum eru bæði løgregla og fjølmiðlar. Amr. filmur frá 1974.

**Fríggjadag 21. kl. 21.35**



## Baskerville hundurin

Dr. Watson (Ian Hart) og Sherlock Holmes (Richard Roxburgh) eru í høvuðsleiklutunum í stórslignu filmatiseringini hjá BBC av Holmes-klassikaranum Hound of Baskervilles.

**Týsdag 25. kl. 22.20**

## Mythbusters

Vertirnir báðir, Adam og Jamie, hyggja nærri at mytum, sum ganga millum fólk, og vita eftir um hesar myturnar eru sannar ella ikki. Við skemti og pedagogikki føra vertirnir báðir okkum inn í vísindina, og vit síggja eina samanrenning millum stuttleika og seriøsar vísindaligar royndir.

**Sunnudag 23. kl. 20.00**

Televarpið

Fleiri rásir - einki roks

**Filmir í hópatali • Barnasendingar • Dokumentar • Náttúra • Tíðindi alt samdøgrið**